## Kreppa eisini í Australia



Fíggjarliga kreppan er altjóða, og hinumegin klótina hevur aurtralska stjórnin boðað frá einum hjálparpakka áljóðandi 42 milliardir australskar dollarar, skrivar dagblaðið The Australian. Australski búskapurin hevur í mong ár notið gott av einum boomi í heimsnýtsluni av metalli, sum stóra landið er ríkt av, men nú er ballið buið. Endamálið við hjálparpakkanum er at útvega 90.000 nýggj arbeiðspláss komandi tvey árini. Íløgur verða eitt nú gjørdar í skúlar, almennar íbúðir, bjálving av húsum og sólhita skipanum. Saman við hjálparpakkanum hevur stjórnin kunngjørt, at fíggjarlógin í ár fer at geva eitt undir skot uppá 22,5 milliardir australskum dollarum, meðan arbeiðsloysið væntandi verður 5,5% í juni móti einari metan í undanfarna fíggjarlóg um eitt arbeiðsloysi á 4,3%. Australski tjóðbankin, Reserve Bank of Australia, hevur harumframt lækka rentuna 100 basisstig til 3,25%, sum er tað lægsta í 45 ár. Rentulækkingin var kortini, sambært Bloomberg, væntandi á marknaðinum. Australski dollarin kostar í meðal 3,68 krónur og tað merkir, at hjálparpakkin er verdur góðar 150 milliardir krónur, skrivar boersen.dk.

# Byggja skótadepil fyri 12



*Allur skótadepilin verður bygdur rundanum um tað stóra bálplássið í miðjuni, sum Hjálpirót hevur skipað fyri.*

**Skótarørslan í Føroyum tekur nú eitt ódnartak fyri at skapa ein framkomnan og nýskapandi depil á Selatrað, sum fer at gera tað nógv stuttligari at vera skóti**

SKÓTALÍV
*Áki Bertholdsen*
*aki@sosialurin.fo*

Tá ið KFUM skótarnir í Føroyum hittast til eyka landsstevnu á Selatrað leygardagin, skulu teir taka eina stóra avgerð.

Tí tá skal avgerðin fella um tey skulu fara undir eitt ódnartak fyri at gera ein nýggjan og framkomnan skótadepil á Selatrað.

Magni Laksáfoss, skótaovasti hjá KFUM skótunum, sigur, at tey hava í eina tíð arbeitt við eini ætlan um at nútímansgera skótadepilin á Selatrað.

Úrslitið av tí arbeiðnum er, at á landsstevnu leygardagin verður eitt uppskot til ein nýggjan skótadepil løgd fyri fundin til góðkenningar.

Talan er um skótadepil, sum bæði skal nøkta tørvin á stórum legum og á smærri legum og tað bæði uttandura og innandura, umframt at tað skal vera góðar umstøður til at halda skeið og fundir.

### 12 milliónir

Skótaovastin sigur, at tilsamans er talan um ein nýggjan skótadepil fyri 12 milliónir.

- Vit umhugsaðu at gera ábøtur á deplinum á Selatrað, men hvussu vit so vendu og snaraðu tí, komu vit bert at fáa eina hálva loysn fyri at kalla fullan prís.

Hann sigur, at sostatt hava tey heldur gjørt av at umkalfatra allan skótadepilin sum hann er og at gera ein nýggjan depil, heilt frá botni av.

Skótahúsið, Kambur, á Kambsdali er selt, tí bygdin vaks inn á skótarnar.

- Tá ásannaðu vit, at tað varð neyðugt at miðsavna okkum um ein skótadepil í Føroyum og úrslitið er so fyriliggjandi uppskot um hendan nýggja depilin á Selatrað. Talan er um eina heildarloysn, sum fevnir bæði um landsslagið og um bygningar og aðrar hentleikar.

Tað merkir, at flestu bygningarnir, sum eru á skótadeplinum á Selatrað nú, verða tiknir niður, ella fluttir og nýtt bygt ístaðin

Í deplinum verður eitt stórt, nýtt leguhús, umframt smærri hús, skúrar til amboð, bálpláss, tjaldingarpláss og annars alt, sum hoyrir einum framkomnum skótadepli til.

### Bæði stórt og smátt

Verður ætlanin góðkend á landsfundinum, verður farið til verka beinanvegin

Men av tí, at talan er um eina stóra og dýra verkætlan, verður arbeiðið gjørt so hvørt, sum ráðini verða til tað.

Men ætlanin er at hava tað stóra bálplássið liðugt longu á landsleguna, sum skal vera í summar. Roynt verður eisini at hava Úlvadalin lidnan í summar og tá er eisini ætlanin at planta rundanum Rovarasmáttuna.

Saman við tí tey fingu fyri húsið á Kambsdali, hava tey útvegað sær ein startkapital upp á millum tvær og tríggjar milliónir.

Men tey fara nú at søkja um stuðul ymsastaðni frá og tey fara at byggja, so hvørt tey fáa stuðul.